## DAGSINS MEINING

# Rætta skipið og rætta støddin

Nú hevur nýggi Smyril verið í høvuðstaðnum og er vorðin sýndur fram her. Móttøkan var stórfingin og tað má eisini sigast at vera uppiborið. Smyril er eitt stásiligt og stórt far. Onkur hevur rikið uppundir, at Smyril er ov stórur og einstakar røddir hava eisini verið frammi um, at hann ikki er tann rætta íløgan. Til støddina er at siga, at tann, ið ikki vanliga siglir um Suðuroyarfjørð á vetrardegi, kann illa úttala seg um støddina á tí skipi, ið har skal sigla. Vit eiga at hava í huga, at skipið skal sigla hvønn dag í øllum veðri. Suðuroyarfjørður er ikki tespiligur á vetrardegi. Tað skip, sum skal sigla har í øllum veðri við fólki og farmi, skal verða eitt stórt skip. Her skal vera bæði trygd og komfort undir øllum umstøðum. Tann, ið røkir hesa farleið, tað vil siga hitt almenna, kann ikki í 2005 bjóða ferðafólki annað enn tað tryggasta og tað besta.

Tá vit hugsa um, at landsmenn norðanfyri kunnu koma fram í meginøkinum í bili nátt sum dag, og tá vit hugsa um, at 85% av landinum nú eru eitt fastland, so kunnu suðuroyingar ikki hjálpast við tí næstbesta. Teir skulu heldur ikki hjálpast við tí næstabesta. Tað vil við øðrum orðum siga, at suðuroyingar skulu hava ta bestu skipaloysina, sum gevst við tí tøkni, ið er til taks. Tey, sum siga, at skipið er ov stórt, eiga at hugsa um hetta. Hetta merkir so aftur, at skipið er ikki ov stórt. Skipið hevur ta stødd, ið trygd og komfort krevja í dag, og hetta er alt samalt suðuroyingum vælunt.

Nakað annað er, at skipið er so stórt og gongur so skjótt, at tað kundi verið nýtt til gleði fyri onnur enn suðuroyingar, tá tað kortini liggur við bryggju. Hví ikki gera rundferðir innanoyggja um summarið, so fólk aftur kundu sloppið at uppliva landið frá sjósíðuni umborð á hesum einastandandi fari? Tað hevði borið væl til millum túrarnar. Og hví ikki ein túr til Skotlands um vikuskifti? Og hví ikki nú fara king landið og vísa skipið fram? Hetta skip er ogn hjá okkum øllum, og vit øll eiga at vera stolt av tí. Tí vildi tað verið eitt gott stig, um leiðslan á SL fór kring landið at vísa skipið fram.

Tey, sum planløgdu og fyrireikaðu nýggja Smyril, vóru framskygd og skipið livir upp til tey krøv, ið Suðuroyingar og vinnulívið í oynni eiga at kunna seta og hava rætt til at seta í dag. Tað er lítið at ivast í, at við øktu og bøttu møguleikunum fara fólk at ferðast meira. Smyril er tí ein góð íløga, sum støðan er nú, men sum frálíður eiga myndugleikarnir at fara undir at kanna møguleikarnar fyri føstum sambandi til Suðuroyar. Við hesum fara vit at fegnast um, at fólk norðanfjørðs sluppu at heilsa nýggja Smyrli og fara enn einaferð at ynskja suðuroyingum og annars øllum tilukku við nýggja farinum. Hóast Suðuroyingar siga: "Okur eiga Smyrol", so siga vit: Allir føroyingar eiga Smyril. Og hann er einki minni enn ein tjóðskaparligur stoltleiki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgtingsmenn blaka fólki torvmold í eyguni

**Seinasta dømi um hetta fyribrigdi sóu vit hjá løgtingsmanni í Javnaðarflokkinum og formanni Tjóðveldisfloksins, í ósemjuni við Starvsmannafelagið**



**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*

Løgtingsmaðurin í Javnaraflokkinum vildi ikki, at løgtingið skuldi blanda seg upp í trætuna, tí tað var at skerja rættindi hjá fakfeløgunum. Hesin løgtingsmaður merkti einki til ósemjuna, tí hann búleikast í miðstaðarøkinum.

Men 6. juli 2005 atkvøddi hesin "moralski" løgtingsmaðurin fyri, at rættindini hjá fakfeløgunum vóru skerd, tá íð SEV maskinmeistararnir við lóg vóru tvingaðir aftur til arbeiðis. Og ein orsøk til hetta var helst, at løgtingsmaðurin nú sjálvur merkti svian av ósemjuni.

Formaður Tjóðveldisfloksins hevur moralskar trupulleikar tí løgmaður ætlaði at fara í løgtingið, fyri at hjálpa útjaðaranum. Men í juni 2003 ætlaði Tjóðveldisflokkurin, við formanninum á odda, at fara í løgtingið, fyri at leingja sáttmálan hjá SEV maskinmeistarunum, so her er eingin orsøk til at hava moralsk uppstødd av hvat onnur gera, ein kann bert taka í egnan barm.

Nú verður áhugavert at síggja, hvat hesir "moralistarnir" fara at gera, tá ið maskinmeistararnir hjá SEV møguliga fara í verkfall 1. desember 2005.

Livst so spyrst.

# Føroyskir tónar á Norðurbryggjuni

**Fríggjadagin 28. oktober fer Aldubáran at framføra á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Við sær hava tey Hanus G. Johansen, Karl M. Samuelsen og Onnu Mariu Olsen. Leygardagin 29. oktober fer Det Syngende Selskab at at framføra og har er føroyski Ernst Dalsgarð ein av sangarunum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Konsertin fríggjadagin er í tveimum.

Hanus og Aldubáran hava áður spælt saman og hava givið úr fløguna Bouquet (1999), har tað snýr seg um løg hjá Hanusi, sum limir á Aladubáruni hava sett út fyri bólkin, og har Hanus sleppur at føra fram á sín kenda og vældámda hátt, men við fylguspæli frá klassisku ljóðførunum í Aldubáruni.

Páll Sólstein, ið eisini leikar horn í Kongaliga Kapelorkestrinum, hevur gjørt løg til yrkingar hjá ymsum føroyskum yrkjarum, t.d. Chr. Matras og W. Heinesen. Aldubáran spælir, meðan Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen syngja.

Hendan konsertin er fríggjadagin klokkan 20.

### Syngjandi fólk

Kvøldið eftir fer Det Syngende Selskab á pallin á Norðuratlantsbryggjuni. Ein av sangarunum har er Ernst Dalsgarð, tenor, ið m.a. starvast við Det Kgl. Teater, Det Ny Teater, Den Jyske Opera og Den Fynske Opera. Konsertin leygardagin 29. oktober byrjar klokkan 20.

Meira fæst at vita við at vitja heimasíðurnar www.aldubaran.fo og www.detsyngendeselskab.dk

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.